# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Okkurt bendir á, at Russland roynir at ræða Georgia frá at knýta seg ov tætt at Evropasamveldinum og NATO*

*(Per Stig Møller)*



*Í Suðurossetia eru nógv íbúðarhús bumbað, og umleið 40.000 fólk eru flýdd heiman (Mynd: Polfoto)*

## Russar á veg inn í sjálvt Georgia

**Russiski herurin hevur nú meiri enn 9.000 hermenn og 350 stríðsvognar umframt flogfør í Georgia**

Russland tykist ikki hava nakrar ætlanir um at gevast við tí hernaðarliga átakinum í Goergia. Tvørturímóti segði georgiska innanríkisráðið fyrrapartin, at Russland hevur styrkt sína hernaðarligu støðu í Suðurossetia og í Abkhasia, og at russiskir hermenn eisini eru í sjálvum Georgia.

Russiska tíðindastovan Interfax vil vera við, at Russland hevur nú meiri enn 9.000 hermenn, 350 stríðsvognar og fleiri flogfør í Suðurossetia og Abkhasia.

Bretska sjónvarpsrásin Sky News segði í morgun frá einum georgiskum embætismanni, at georgiski býurin Gori var fyri ógvusligum álopum frá russiskum bumbuflogførum og kanónum. Gori, sum hevur umleið 50.000 íbúgvar, er bara 60 kilometrar frá georgiska høvuðsstaðnum Tblisi.

- Russar bumbaðu Gori í gjárkvøldið og í nátt, og vit hava ábendingar um, at teir fyrireika seg til eitt veruligt stórálop á býin, tí teir hava savnað nógvar stríðsvbognar uttan fyri býin, sigur georgiski stjórnartalsmaðurin, Sjota Utjasjvilj, sambært Reuters.

- Vit hava ikki sæð nakrar russiskar hermenn enn, men vit rokna við, at teir eru á veg, sigur Utjasjvilj. Hann leggur afturat, at georgisku hermenninir hava skotið eftir teimum russisku støðunum fyri at forða teimum í at taka seg fram.

Skuldi tað hent, at russiski herurin tekur Gori, so er tað fyrstu ferð í krígnum, at russiskir hermenn fara inn í sjálvt Georgia.

## Skaðiligt fyri viðurskiftini millum USA og Russland

**Halda tær russisku herdeildirnar fram við átøkunum í Georgia, fær tað skaðiligar avleiðingar fyri viðurskiftini millum Russland og USA**



*George W. Bush, forseti, og Vladimir Putin, forsætisráðharri, hittust beint áðrenn olympisku setanina í Beijing (Mynd: Polfoto)*

Tað segði ein talsmaður fyri Hvítu Húsini við tíðindastovuna AP í gjár. Ávaringin kom, beint eftir at tíðindastovurnar høvdu borið tíðindi um, at Russland hevði sent nógvar hermenn afturat til Suðurossetia, og at russar hildu á vbið at bumba mál inni í sjálvum Georgia. Um somu tíð vildu georgisku myndugleikarnir vera við, at Russland fyrireikaði eitt stórálop á landið.

Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum segði, at viðurskiftini millum Moskva og Washington kunnu fáa álvarssaman og varandi skaða av russisku framferðini í Georgia.

- Tað, sum hendir, er sera vandamikið, og Russland eigur at gera sítt til at fáa frið í økinum, soleiðis sum USA vil, segði Jim Jeffrey, talsmaður.

Georgiska stjórnin hevur biðsð Condoleezzu Rice, uttanríkisráðharra royna semju.

STUTT SAGT

### Fødd 08.08.2008 kl. 20.08



*Astrid Sofía valdi at bíða til ta røttu løtuna (Mynd: Aftenposten)*

Fleiri kunnu í komandi árum vísa á, at tey blivu gift tann 8.8. í 2008, men norska Astrid Sofía kann vísa á, at hon bleiv født tann 8.8.2008 og so enntá klokkan 20.08. Astrid Sofía kom í heimin tríggjar dagar seinni enn ætlað, men kanska hevði hon sína orsøk til at bíða.

Tað verður sagt, at nógvar kinesiskar kvinnur velja at fáa fosturtøku, fyri at teirra barn skal koma í heimin ein ávísan dag, men á sjúkrahúsinum í Frederiksstad í Noregi halda tey ikki, at tað er nakað aftur ímóti tí, sum hendi har seinasta fríggjakvøld. Har var tað tvørturímóti barnið sjálvt, sum ásetti dagin, skrivar Aftenposten.

### Keyptu leikhús í Svøríki



*Árni Þór Vigfússon og Kristján Ra. Kristjánsson (Mynd: Vísir)*

Tey seinastu fýra árini hava slendingarnir Árni Tór Vigfússon og Kristján Ra. Kristjánsson sett fleiri sangleikir upp í Svøríki, og nú hava teir keypt tvey av leikhúsunum í svenska høvuðsstaðnum. Talan er um leikhúsini Gøta Lejon og Maxim Teatern. Tað fyrra er eitt av teimum stóru leikhúsunum í Stockholmi. Teir básðir íslendingarnir hava rikið bæði leikhúsin síðani seinasta vetur, men nú hava teir so keypt tey, skrivar Vísir.

Millum sangleikirnir, sum Árni Tór Vigfússon og Kristján Ra. Kristjánsson hava sett upp í Stockholm, eru so kendir leikir sum Grease og Footlose. Teir hava eisini arbeitt aðrastaðni í Norðurlondum.